# Creamy tók land

*Creamy og Kular Røtur vóru fram úr, tá 4000 fólk fingu ta› besta tónleikaliga undirhaldi›, sum er til børnini í Danmark og Føroyum í løtuni*



Myndir: Jens Kr. Vang

Ey›un Klakstein

Hestahalar og rottuhalar rugga›u í takt, tá Creamy tók øll á bóli vi› tveimum imponerandi konsertum í vikuskiftinum.

Bassi á vegginum, Nósi á pallinum, og millum gular jakkar, grønar troyggjur og rey›ar buksur smeyg poppurin sær lættliga og lívliga runt í høllini.

Leygardagin var hálvføroyski poppbólkurin á palli í Havn, og ta› gjørdist til eina rættiliga sigursfer› hjá donsku barnasangunum. Sunnudagin var sama skil í Runavík.

Creamy er meira enn bara Rannvá og Rebekka, ta› er eitt stórsligi› og professionelt konsept, sum til fulnar klárar at halda høga fer› í ein tíma. Creamy fingu børnini – og tey vaksnu – at liva vi›, syngja vi›, dansa vi› og klappa vi›.

Tær bá›ar genturnar, sum eru andliti› hjá Creamy, eru fram úr á pallinum. Tær vóru tryggar í øllum pørtunum av framførsluni, og tær dugdu serstakliga væl at upptra›ka.

Creamy var betri, flottari og størri, enn tey flestu mundu hava vænta›, og í hesum liggur eisini ein orsøk til, at tey knapt 4000 fólkini, sum vóru á konsert í vikuskiftinum, fingu eitt hugtakandi og stuttligt upplivilsi.

Tey vóru einfalt tikin av fótum.



## Kulu røturnar

Bæ›i í Havn og Runavík vóru ta› Kular Røtur úr Klaksvík, sum hita›u upp í stívliga 20 minuttir, og føroyska ískoyti› stó› einki aftanfyri ta› danska høvu›snavni›, tá ta› kom til tónleik og sang. Ta› hendi meira á pallinum, tá Creamy leg›i til brots, men Kulu Røturnar hava avgjørt naka› at byggja á.

Sangirnir eru frálíkir, og teir rigga væl á konsert. Jógvan Hansen og Arnfrí› Lützen, sum syngja sangirnar hjá rótunum, eru tveir gó›ir sangarar, og hesa fer› mundi yngra systur Arnfrí›, Rannvá, taka mong á bóli, tá hon sang sangin um Nósa saman vi› stórusystrini. Ein hugtakandi framførsla, sum mann fara ver›a vi›virkandi til, at Rannvá ver›ur meira at hoyra framyvir.

Kular Røtur sungu um Bilin hjá okkum, Veru, 20 robottar og Grønar menn frá Pluto. Allir sangir, sum komu út á fløgu stutt fyri jól. Klaksvíkingarnir enda›u vi› eini forpoppa›ari útgávu av kenda barnasanginum um at klappa, trampa og floyta, tá lagi› er gott.

Eftir konsertirnar er ta› ikki undarligt, um ma›urin aftanfyri Kular Røtur, Steintór Rasmussen, bæ›i klappar, trampar og floytar.

Kular Røtur vóru kul!

## Vi› fullari fer›

Creamy vóru á pallinum í tvær fer›ir hálvan tíma, og serliga fyrra hálvan var væl eydna›.

Frá tí at tær fyrstu fer› skreiddu inn á pallin, og til tær fóru avaftur pallinum hálvan annan tíma seinni, var full fer› á. Saman vi› Rannvu og Rebekku vóru eisini onnur fólk á pallinum, og ta› gjørdi, at ta› hendi nógv.

Tveir ungir dreingir dansa›u og upptra›ka›u, tveir tónleikarar spældu ávíkavist percussion og keyboard, og ein frálík sangarinna sang vi›. Hon hev›i fingi› pláss í einum horni av pallinum, og hon skuldi ivaleyst líkjast eini kórsangarinnu, men hon sang fyri ta› mesta saman vi› Rebekku og Rannvu, og tá røddir eisini vóru vi› í playback-tónleikinum hev›i ta› vi› sær, vokalparturin stó› sterkur allatí›ina.

Saman vi› fólkunum var ein øgrynna av búnum og a›rari útger› flogin til landi›. Fleiri risastórir figurar vóru blástir upp á pallinum, genturnar og dreingirnir skiftu alla tí›ina klæ›i, og nógv var› gjørt burtur úr at geva tónleikinum eitt eyka spark í afturpartin.





Og ta› eydna›ist. Ta› gekk skjótt og gott fyri seg allatí›ina. Timingin var nærum fullkomin, og heldur ikki eitt tekniskt brek móti endanum av konsertini hev›i nakra serliga ávirkan, hóast ta› var um at gerast ein trupulleiki, at anleggi› eftir øllum at døma var fyri einum blackouti í ein ella tveir minuttir.

## Fæl fyriskipa

Donsku sangirnir hjá Creamy hava veruliga fanga› føroysku børnini, sum sungu vi› av fullum hjarta.

Æblemand, Krabbesangen, Se min kjole og allir hinir kendu barnasangirnir vóru útsettir fyri teldupopp, og ta› var gjørt so sannførandi, at ta› mundi ver›a tey fægst sum ikki lótu stórutá dansa í takt vi› tónleikin onkra løtuna.

Ta› sást eisini, at Rannvá var ikki sørt fegin um at ver›a á palli í Føroyum. Hon tosa›i stundum føroyskt millum sangirnar, og vinkonan Rebekka hev›i eisini lært seg onkran føroyska setning til konsertirnar.

Stóra fjøldin av børnum, ungum og vaksnum hugna›u sær, og ta› var ein fragd at síggja, hvussu væl konsertirnar vóru fyriskipa›ar. A›rar konsertir kundu lært nógv av hesum konsertum, sum byrja›u til tí›ina, høvdu gott undirhald og gó›an stemning alla tí›ina.

Kanska er ta› lættari at hava konsertir vi› børnum, men ta› vóru næstan 2000 fólk á hvørjari konsert, og ta› skal ein gó›ur og professionellur innsatsur til fyri at gera ein slíka konsert til eitt gott upplivilsi hjá øllum.

Creamy og Kular Røtur góvu føroyingum ta› besta innan tónleikarligt undirhald til børnini á konsertunum í Havn og Runavík.

Ta› krima›i. Og ta› var kul.







